# FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
LØNARDEILDIN

Til stovnar hjá landinum

**Argir, tann 1. november 2013**
**J.nr.: 13/00179-6**
**(at tilskila í svari)**

**Tygara skriv.:**

**Viðgjørt:**

**Viðvíkjandi avtaluni um ferðing innanoyggja, at náttin er 8 tímar**

Í avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Felag Tænastumanna Landsins um dagpening stendur í § 1 stk. 4: *Náttarviðbót verður veitt fyri at hava ligið nátt burtur frá tænastustaði, hevur arbeiðsgevarin ikki ávíst honum innivist. Náttin verður roknað til 8 tímar.*

Spurt hevur verið, hvat tað merkir, at náttin verður roknað til 8 tímar, tá ið tímapeningur skal verða roknaður. Tað kann verða sagt soleiðis:

**At náttin verður roknað til 8 tímar merkir, at tá ið starvsfólk á tænastuferð hevur ligið nátt, og tímapeningur skal roknast, skulu fyrst 8 tímar verða drignir frá, og tá er ikki munur á, um starvsfólkið hevur ligið nátt hjá onkrum kenningi, ella um arbeiðsgevarin hevur ávíst og goldið fyri innivist.**

Dømi 1:
Starvsfólk er á tænastuferð, sum varir 24 tímar.
Starvsfólkið liggur nátt hjá onkrum kenningi, og fær tí náttarviðbót 230 kr.
Starvsfólkið fær tímapening fyri 24 - 8 = 16 tímar, t.e. fullan dagpening.

Dømi 2:
Starvsfólk er á tænastuferð, sum varir 17 tímar.
Arbeiðsgevarin ávísir starvsfólkinum innivist, og starvsfólkið fær tí ikki náttarviðbót.
Starvsfólkið fær tímapening fyri 9 tímar, t.e. 17 tímar minus 8 tímar.

Tulkingin samsvarar við, at fullur dagpeningur fæst fyri 16 tímar (24 – 8), og at starvsfólkið fær ikki pening tvær ferðir fyri somu tímar, nevniliga teir 8 tímarnar, sum náttin varir.

Tað kann verða lagt aftrat, at Felag Tænastumanna Landsins er ikki samt í hesari tulkingini, men Fíggjarmálaráðið hevur sum kunnugt tulkingarfyrimunin.

Vinarliga

Snorri Fjallsbak

Traðagøta 39 • Postsmoga 2039 • FO-165 Argir
Telefon: + 298 35 22 00 • Telefax: + 298 35 22 01 • E-mail: LND@LND.FO